# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Svimjarar úr Fuglafirði skriva søgu

**Í vikuskiftinum skipaði svimjifelagið Reki fyri stórari svimjikapping í Leirvík. Tiltakið var sera væl eydnað, og nógvir luttakarar vóru møttir.**

SVIMJING
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*



*Trýburðarnar Theodor, Tórur og Birgir Jacobsen, ið umboðaðu Fuglafjarða Svimjifelag í kappingini, ið Reki fyriskipaði, seinasta vikuskifti*

Millum teir nokk mest sermerktu vóru trýggir bróður – trýburðar, og teir umboðaðu Fuglafjarða Svimjifelag, hesir eru Jacobsen brøðurnar; Theodor, Tórur og Birgir. Afturat teimum høvdu teri einans brúk fyri einum, til tess at manna eina stafett, og so var. Teir høvdu Jørmund Torkilsson afturat sær.

Hesir fýra ungu piltar svumu finalu móti einum liði í Reka, men hesir vórðu, ungu fuglfirðingunum ov sterkir, og Reki vann sostatt. Finalan, talan er um í hesum føri, var 4x33 metur fyri dreingir.

### Eindømi

Tað man vera fyrstu ferð í føroyskari svimjisøgu, at trýburðar svimja í somu stafett í kapping í Føroyum, og má tað sigast at vera ikki sørt stuttligt hjá hesum ungu piltum, at sleppa at uppliva hetta.

Kappingin var annars skipað soleiðis, at kappast varð í trimum bólkum, hesir vóru:

Bólkur 1 (0-10 ár)
Bólkur 2 (11-12 ár)
Bólkur 3 (13-14 ár)

Kappingin gekk væl hjá summum feløgum, og minni væl hjá summum. Omanfyri sæst samlaða heiðursmerkjabýtið í hvørjum einstøkum bólki:

## FAKTA

| Bólkur 1 | Gull | Silvur | Bronsa |
|---|---|---|---|
| H.S. | 9 | 3 | 0 |
| Ægir | 4 | 4 | 4 |
| Reki | 1 | 7 | 2 |
| F.S. | 0 | 2 | 0 |
| SuSvim | 0 | 1 | 5 |
| Skeggjar | 0 | 0 | 0 |
| Flot | 0 | 0 | 0 |

| Bólkur 2 | Gull | Silvur | Bronsa |
|---|---|---|---|
| SuSvim | 6 | 9 | 7 |
| Reki | 5 | 0 | 2 |
| Ægir | 4 | 2 | 3 |
| Flot | 1 | 2 | 3 |
| F.S. | 0 | 2 | 0 |
| H.S. | 0 | 0 | 0 |
| Skeggjar | 0 | 0 | 0 |

| Bólkur 3 | Gull | Silvur | Bronsa |
|---|---|---|---|
| Flot | 7 | 3 | 8 |
| Reki | 6 | 6 | 5 |
| F.S. | 2 | 5 | 0 |
| Skeggjar | 1 | 0 | 0 |

# Fyrsta tap síðan 7. apríl fyri Arsenal



*A.C. Milan, ið eru Champions League meistarar, eftir at teir vunnu finaluna í fjør 2-1 móti enska stórliðnum Liverpool*

**Arsenal spældu í gjárkvøldið á útivølli móti spanska Sevilla í bólki H í Champions League kappingini, og haðani fingu teir onki givið, tí til tess vóru Sevilla leikararnar alt ov tendraðir og vælspælandi**

FÓTBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Fimta umfar var í gjárkvøldið spælt í Champions League, og her var greitt at Arsenal taptu ímóti Sevilla, Manchester United sníktu seg til sigurs, móti endanum, móti Sporting og Rangers taptu tepurt í Týsklandi.

Í september vunnu Arsenal 3-0 á heimavølli móti Sevilla, men heima í Spania er tað heilt ørðvísi at spæla, tí har eru Sevilla sera sterkir. Eitt sindur av hesari styrki vístu teir Arsenal, tá teir vunnu 3-1, hóast Arsenal løgdu seg á odda longu eftir 11 minuttum.

Heima á Old Trafford vóru Manchester United tætt við bert at fáa javnt móti einum treyskum Sporting liði, men tað skuldi vísa seg at vera fyrrverandi Sporting leikarin, Cristiano Ronaldo, ið skuldi verða avgerandi figururin í kvøldsins dysti. Tí í tíðini, ið dómarin hevði lagt afturat, skoraði hann við frísparki og vann sostatt dystin fyri reyðu djevlarnar úr Manchester. Sigast skal annars at Nani, ið umboðar United, eisini er fyrrverandi Sporting leikari, so tað er við blandaðum kenslum, at hesir báðir hava eftir dystin á Old Trafford í gjárkvøldið.

Í Stuttgart í Týsklandi vitjaðu skotarnar úr Glasgow Rangers, og skuldi hetta vísa seg at verða ein sonn málveitsla, tí tá dómarin bríksladi fyri síðstu ferð í dystinum, stóð máltalvan á 3-2 til VfB Stuttgart. Stuttgart leikarin Ciprian Marica skoraði tá fimm minuttir írestaðu.

**Hini úrslitini vórðu:**
**Bólkur E:**
Lyon-Barcelona 2-2
Stuttgart-Rangers 3-2

**Bólkur F:**
D.Kiev-Roma 1-4
Man Utd.-Sporting 2-1

**Bólkur G:**
CSKA Moskva-PSV 0-1
Inter-Fenerbahce 3-0

**Bólkur H:**
Sevilla-Arsenal 3-1
Steua Bucarest-Slavia Prague 1-1

Í kvøld vera so írestandi dystirnar í fimta umfari av Champions League, og tá spæla:

**Bólkur A:**
Besiktas-Marseille
Liverpool-F.C. Porto

**Bólkur B:**
Rosenborg-Chelsea
Valencia-Schalke04

**Bólkur C:**
Lazio-Olympiakos
Werder Bremen-Real Madrid

**Bólkur D:**
Benfica-A.C. Milan
Celtic-Shakhtar Donetsk